Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

Tórshavn 1. oktober 2018

# ALMENNUR FUNDUR

## HVUSSU SKIPA VIT REHABILITERING Í FØROYUM?

## *- gev borgarunum megi og mót aftur*

**Sambandsflokkurin skipar fyri almennum fundi**

Sambandsflokkurin skipar fyri einum politisk-fakligum fundi um, hvussu vit skipa rehabilitering í Føroyum.

Almenni fundurin verður í Norðurlandahúsinum, Skálin, hósdagin 25. oktober 2018, kl. 09.00-12.00.

**Bakgrund og endamál**

Bakgrund

Í løtuni eru vit í Føroyum langt frá at hava eina fullfíggjaða og samanhangandi skipan, har fólk kunnu rehabiliserast. Vit hava t.d. ikki éina skipan, sum fevnir bæði um fysiska-, sálarliga- og sosiala viðgerð. Hetta merkir, at so at siga ongin samskipan er millum økini og sjúkrahúsini. Í Føroyum hevur ein persónur ikki nøkur rættindi ella krav um, at ein løgd rehabiliteringsætlan skal fylgjast, sum t.d. er galdandi í Danmark.

Hetta hevur við sær, at nógv fólk, sum hava tørv á rehabilitering detta niður ímillum í samfelagnum, tí tey fáa ikki neyðugu hjálpina. Tey, sum eisini verða rakt av vantandi tilboðum um rehabilitering eru tey avvarðandi. Eisini hevur hetta við sær, at alt ov lítil ella ongin sjúkufyribyrgjandi innsatsur verður gjørdur - gerst tú sjúkur, gerst støðan bara verri og meira røktarkrevjandi fyri sjúkrahús, almannaverk og tey avvarðandi.

WHO hevur hesa allýsing av rehabiliteringshugtakinum: "Rehabilitering kann allýsast sum ein røð av innsatsum, sum stuðlar tað einstaka menniskja, sum hevur ella er í vanda fyri at fáa lægri virkisføri - hetta at stuðla teimum í at uppnáa og halda viðlíka best møguligt virkisføri, herundir at virka í samspæli við umhvørvi í samfelagnum."

Samfelagsbúskaparliga hevði tað verið ein stórur fyrimunir, um hesi komu aftur út í lívið at virka best møguligt og fingu aftur eitt dygdargott lív.

Talið á teimum, sum hava tørv á rehabilitering er stórt og í vøkstri, serliga tí vit liva longri, gerast fleir eldri borgarar og tað eru alt fleiri lívsstílssjúkur, sum raka okkara samfelag.

Tí er hetta evnið politisk sera viðkomandi og eigur at verða sett á politisku dagsskránna nú.

Endamál

Endamálið hjá Sambandsflokkinum við almenna fundinum er fyri tað fyrsta at lýsa støðuna og teir trupulleikar, sum eru á rehabiliteringsøkinum og sostatt alment varpa ljós á veruliga tørvin á einari skipan við rehabilitering.

Harafturat er endmálið at seta veruliga politiska gongd á hetta arbeiðið og byrja við at fremja nakrar lógarbroytingar og fáa politisku skipanina saman við avvarðandi stovnum at fara undir eina stovnan og uppbygging av einari rehabiliteringsskipan.

**Málbólkar**

Fundurin vendir sær til politisku skipanina, almennar stovnar á heilsu og almannaøkinum, vinnuna og aðrar viðkomandi áhuga-bólkar.

**Innihald**

Høvuðsevnið:

- Hvussu skipa vit rehabilitering í Føroyum? - *gev borgarunum megi og mót aftur*

Framløgur:

- At venda aftur til lívið og gerandisdagin, Rósa Samuelsen, fyrrv. løgtings- og landsstýriskvinna
- Tørvurin á rehabilitering í Føroyum, Sólbjørg Frederiksberg
- Rehabiliteringsskipanin í Danmark og ætlanir um menning, Claus Vinther Nielsen
- Framløga um nýggjar lógarásetingar um rehabilitering: Løgtingssamtykt um eina tvørfakliga rehabiliteringsskipan í heilsu- og almannaverkinum og Lóg um sjúkrahúsverkið, Rósa Samuelsen, fyrrv. løgtings- og landsstýriskvinna

Sí skránna her: www.samband.fo

**Atgongd**

Tað er ókeypis at møta til fundin og ikki neyðugt við tilmelding.

Møguligir spurningar um fundin kunnu setast til Floksskrivstovuna hjá Sambandsflokkinum:

Tlf. 312492 ella Tpost: samband@olivant.fo